# Skrivstovufólk

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Sýnsumsiting til setan skjótast gjørligt. Talan er um eitt avloysarastarv til í fyrsta umfari 1. juni 2004.

**Uppgávan:**
Uppgávan fevnir m.a. um:
- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Umsiting av sýnstíðum, umsýnstíðum, rykkjaraskipan og eftirstøðum
- Dagliga uppgerð av kassa
- Annað fyrifallandi arbeiði

**Førleikakrøv:**
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving.
Dentur verður lagdur á góð samstarvsevnir og at viðkomandi er fyrikomandi og kundavinarligur. Tað er ein fyrimunur, um viðkomandi hevur kunnleika til at arbeiða við teldu.

**Setanartreytir:**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið til tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til tlf. 350400 og tosa við Hans J. Stenberg ella Tórunn Miðberg. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 17. november 2003.

**Bileftirlit Føroya**
Hoyvíksvegur 57
Postsmoga 3206
110 Tórshavn

*Bileftirlit Føroya er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Bileftirlitið sýnsdeildir um alt landið. Á Bileftirlitinum starvast 18 fólk.*

# Sendistova Føroya í Keypmannahavn

er flutt til
**NORÐURBRYGGJUNA**
**Strandgade 91, 4. sal**
**1401 København K**

Samstundis er tlf/fax nr. broytt soleiðis:

Tlf. +45 3283 3770 Fax. + 45 3283 3775
Teldupostur: Faroes.mission.dk@tinganes.fo




# Útbjóðing

Vegna Fuglafjarðar kommunu verða niðan fyri nevndu arbeiði í sambandi við skúlabygning í Fuglafirði boðin út í almennari útbjóðing.

1. Innandura timbur- og snikkaraarbeiði
2. HVS- og ventilatiónsarbeiði
3. El-arbeiði

Bygningurin er innilokaður og er í tveimum hæddum, tilsamans 750 m².

Lisitatiónin verður í Býráðshúsinum í Fuglafirði tann 8. desember 2003 kl. 14.00, og kunnu teir, ið boðið hava, vera hjástaddir.

Útbjóðingartilfar kann bíleggjast hjá Fuglafjarðar kommunu, tlf. 444006 innan 14. november 2003 móti veðhaldi kr. 5.000,-, sum verður at gjalda inn á konto í Føroya Banka nr. 6460 2205965.

**Fuglafjarðar kommuna, Tekniska Deild**
**P/F Sofus M. Jacobsen, ráðgevandi verkfrøðingur,** Tórshavn
**KJ Elráð, ráðgevandi verkfrøðingur,** Klaksvík

**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Avloysari fyri læknaskrivara

Á **Røntgendeildin** er starv sum avloysari fyri læknaskrivara leyst at søkja til setan 1. januar 2004 - 31. august 2004.

Røntgendeildin er ein deild í støðugari menning, har digital umlegging er byrjað. Umframt vanligar røntgenkanningar verða eisini gjørdar mammografiir, ultraljóð-skanningar, CT-skanningar og MR-skanningar.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum læknaskrivari
- tænastusinni
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- teldukunnleiki

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Jógvan D. Niclasen, leiðandi yvirlækni, telefon 31 35 40, lokal 174 ella 147 L.

Umsóknarfreistin er 25. november 2003 kl. 12.00.

Skivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

## Hyundai Sonata 2.0 bensin



prísur 183.500,-

Myrkagráur · árgang 2002 · km. 32.000
El-rútar · aircondition v.m.
Sera vælhildin

## Toyota Hiace 2.4 diesel



prísur 58.000,-

Hvítur · árgang 1993 · km. 208.000
Summardekk og píkadekk í góðum standi fylgja við

## Ford Focus 2.0 bensin stationcar



prísur 150.000,-

Grønur metallic · árgang feb. 1999
Km. 52.000 · El-rútar framman, hita í forstetrum · hundagittar · krók · multifunktiónsróður
Sera vælhildin

**BILVERKSTAÐIÐ**
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla
Tlf 31 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

Sosialurin 341800

# Skattalistin fyri 2002

Skattalistin fyri Fuglafjarðar kommunu liggur frammi til alment eftirlit á Kommunuskrivstovuni hvønn gerandisdag frá kl. 10.00–15.00.

**frá 12. nov.–26. nov. 2003**

*Fuglafjørður tann 7. november 2003*
**Fuglafjarðar kommuna**

# Kunngerð

## frá útskiftingarnevndini fyri Hvalvíkar bygd

Næsti útskiftingarfundur verður í róðrarneystinum í Streymnesi mikudagin 19. november 2003 kl. 10.

Á útskiftingarfundinum verða metingin av kommunalu ognartøkuni og endaligur útskiftingarplanur fyri útskiftingina løgd fram.

Útskiftingin verður endað og latin til ákæru.

N. v.
Øssur Á Midjord,
útsk. form.



**Suðuroyar Sjúkrahús**
**800 Tvøroyri**

# Anæstesisjúkrarøktarfrøðingur

Eitt starv sum anæstesisjúkrarøktarfrøðingur er leyst til setan frá 1. januar 2004.

Talan er um eitt fulltíðarstarv við vakt frá heiminum.

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til fyristøðukvinnuna tlf. 37 11 33 lokal 128.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til :

**Suðuroyar Sjúkrahús**
**Umsjónarmaðurin**
**800 Tvøroyri**

Umsóknarfreist 26. november 2003

Sosialurin -tað loysir seg

**Rigsombudsmanden på Færøerne**

# Bil til salg



BMW 730i, årgang 1992, 177.000 km, grøn metallak, motor 6 cyl./3000 cm³/188 HK, sælges for højeste bud over 110.000 kr.

Bilen har kørt som ministerbil i Danmark 1992-1997, siden december 1997 kørt på Færøerne som Rigsombudets tjenestebil.

Udstyr: Klimaanlæg, el-drevne ruder, elektronisk temperaturstyring, elektrisk skydetag m.m.

Interesserede kan ringe til Rigsombudet på tlf. 35 12 00, mandag-fredag kl. 10-15.

# Ársroknskapurin fyri 2002

Ársroknskapurin fyri Vestmanna Kommunu liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 11. til 25. november.

# Skattalistin fyri 2002

Skattalistin fyri Vestmanna kommunu liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 11. til 25. november.

**Vestmanna kommuna**

# Skattalistin

Skattalistin fyri Hvalvíkar kommunu fyri árið 2002 liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 13. november til 24. november 2003.

Kommunuskrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.00 til 13.00.

**Hvalvíkar kommuna**




Sosialurin 341800